tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 19 fríggjadagur 27. januar 1995 69. árgangur Krónur 7,00

## 35 fólk flutt úr Føroyum higartil í ár

*Talan er um fólk í besta aldri, ið fara av landinum við familju*

*síða 24*

*JÁKUP SVERRE JOENSEN, fyrrverandi leiðari á Fiskirannsóknarstovuni:*

## Fiskastovnarnir ongantíð verið so illa fyri

*Hvussu veiðan undir Føroyum verður avmarkað, er ein politiskur spurningur, men Jákup Sverre Joensen sigur, at avmarking av onkrum slag má til*

*síða 3*



## ENDILIGA HITTAST LØGMAÐUR OG DOUGLAS HURD

síðurnar 20 & 21

*Ætlaði fundurin millum løgmann Edmund Joensen og bretska uttanríkisráðharran Douglas Hurd í november mánaði varð avlýstur, men nú er nýggjur fundur avtalaður mikudagin 8. februar. Á fundinum, sum verður í Keypmannahavn, skulu teir báðir tosa um marknatrætuna millum Føroyar/Danmark og Bretland*

## FÓTBÓLTSKAPPINGIN BROYTAST

**FSF** *aðalfundurin*

*Ítróttur á síðunum 17, 18 & 19*

## Leita nú eftir avloysara

*síða 5*

**LANDSFUNDURIN '95** verður á SKÁLA 31. mars og 1. apríl

*Føroya Javnaðarflokkur*

**FORREST GUMP ÁRSINS FILMUR** SÝNDUR FYRSTU FERÐ Í KVØLD **HAVNAR BIO**

*Vegamót í marknatrætuni:*

# Løgmaður skal hitta Douglas Hurd

*Ætlanin at hava fund millum bretska uttanríkisráðharran Douglas Hurd og Edmund Joensen, løgmann í Keypmannahavn í november varð av ongum. Men nú røkist okkurt fyri, at hesin fundurin kortini verður 8. februar*








*Kortið vísir okkum part av krøvunum hjá føroyingum, bretum og írum til umstríddu økini*

*Keldu DGU*

Tað mundi koma óvart á flest allar føroyingar, tá tíðindi bórust í fjør um, at løgmaður skuldi hitta sjálvan bretska uttanríkisráðharran í Keypmannahavn. Evnið á fundinum skuldi vera marknaðsemjan millum Føroyar/Danmark og Bretland.

Fundurin tá varð kortini av ongum, tí Hurd bráddliga hevði onnur meira týðandi mál at takast við.

Men avgerð varð ikki tikin um at avlýsa vitjanina í Danmark. Nú verður hon so. Spurningurin er so, um fundur verður millum Hurd og løgmann.

Sosialurin hevur spurt løgmann. Hann hevur bert hetta svar: "Onga viðmerking".

Sosialurin hevur annars fingið váttað frá bretsku sendistovuni í Keypmannahavn, at Douglas Hurd kemur til Danmarkar fyrst í februar mánað.

Vit fáa ikki váttað, um fundur verður millum løgmann og hann, men Sosialurin veit frá øðrum keldum, at fundur verður millum teir báðar, sum áður fráboðað.

Her er talan um ein ikki almennan fund. Men tað verður so marknatrætan, sum verður á skránni henda fundin.

Tvær vikur seinni, tann 21. februar verða aftur samráðingar millum tær báðar nevndirnar.

Á seinasta fundinum kom føroysika nevndin við einum nýggjum útspæli. Tað er hetta útspæl, sum bretar nú hava umrøtt, og tað kann hugsast, at Edmund Joensen og Douglas Hurd fara at tosa um gongdina í samráðingunum og útlitini fyri eini loysn, hóast teir ikki faraút í smálutir.

Møguliga verður fundurin teirra millum eitt vegamót í royndunum at fáa eina loysn á tí longu marknatrætuni millum londini.

jan

[illegible]

hertyn vóru umboð fyri tað almenna danska oljufelagið DONG í Føroyum. Tá høvdu umboðini sjálvandi høvi at hitta landsstýrið men høvuðsdenturin varð lagdur á samskiftu við oljufyrisitingina og oljuráðleggingarnevnd.

-Eg taki tí sum givið, at einki umboð fyri Mærsk hevur verið í Føroyum og havt samráðingar við landsstýrið.

**Hurd og Edmund**

Vit hava eisini spurt Árna Olafson, hvat hann veit um komandi fundin millum Edmund Joensen, løgmann og bretska uttanríkisráðharran, Douglas Hurd.

-Tað var upp á tal, at teir skuldu hittast í november. Men tað varð útsett. Tað einasta eg kann vátta er, at ætlanin, at Hurd skuldi fara til Danmarkar, hevur ikki verið slept. Verður vitjanin til nakað so má ein ganga út frá, at tað gamla programmpunktið um at hitta løgmann er við við

Árni Olafson sigur annars, at fundurin millum føroyingar og bretar um markið nú er ásettur til at vera 21. februar

Í samrøðu við Sosialin fyri stuttum segði Árni Olafson, at ein avklária má fáast í málinum í hesum árinum

Vit u sipaði hann til eina samráðingarloysn ella eina avgerð um at fara til dómstólin í Haag.

jan

---

*Gitingar í Útvarpi Føroya:*

# Hægsti maður hjá AP Møller í Føroyum

*Jess Søderberg, sum er hægsti stjóri í risastóru AP Møllerkonsernini skal hava verið á loyndarfullari vitjan í Føroyum fyri at tosa um olju og gass visti útvarpið at siga frá ónavngivnum keldum mikukvøldið. Sosialurin hevur ikki fingið hetta váttað*

Mikudagin vistu útvarpið at siga frá, at ovasti stjórin í risastóru AP Møller fyritøkuni, Jess Søderberg skal hava verið í Føroyum undir sera loyniligum umstøðum

Frá keldum vistu útvarpið at siga, at Jess Søderberg helst var her í ørindum, sum hava við eina komandi olju og gassvinnu við Føroyar at gera.

Sosialurin hevur roynt at fáa hesi tíðindi váttað, men tað gongst sera stirðið. Løgmaður var ikki at hitta, men skrivari løgmans veit einki um nakran Søderberg, sum skal hava vitjað har. Hon leggur annars aftrat, at løgmaður ynskir ikki at upplýsa nøvnini á øllum teimum fólkum, sum koma á fund við hann í Tinganesi.

Sosialurin hevur eisini spurt seg fyri á FlogfelagFøroya. Lars Larsen, stjóri sigur, at hann kann ikki upplýsa, hvørji fólk eru við flogførunum, men hann veit so einki um, at nakar Søderberg skal hava verið í Føroyum.

Í samrøðu í aðrari grein í blaðnum sigur Árni Olafson, limur í oljuráðleggingarnevndini, at hann einki kennir til, at stjórin í AP Møller konserninini skal hava verið í Føroyum fyri at tosa um olju og gass.

jan



*Jess Søderberg her saman við Mærsk Mc Kinney Møller*